## Fríðka kirkjugarðar í Klaksvík

Nú summarið stendur í fagrasta blóma, eru gravarin og hansara menn í ferð við at sláa kirkjugarðarnar í Klaksvík. Kirkjugarðarnir verða slidnir einar 8 ferðir um summarið, so teir síggja so vakrir út, sum til ber. Tað eru fleiri avvarandi, ið vara um gravir, sum seta sær tíð av til at fríðka um. Men tað eru eisini fleiri gravir, ið ongin hyggur til, og tí standa hesar gravir og misprýða kirkjugarðin. Tað er sera óheppið, tí nógv fólk vitja kirkjugarðarnar, serliga tá summar er. Tí hevði tað verið ógvuliga gott, um avvarandi av hesum gravstøðum høvdu sett seg í samband við gravaran og har fingið eina loysn á trupulleikanum, skrivar kommunan. Í reglugerðini fyri kirkjugarðin stendur millum annað, at tann, sum varar av einum gravstaði, hevur skyldu til at halda tað, so at tað ikki misprýðir. Um hildið verður, at eitt gravstað misprýðir, hevur kommunan rætt til at fáa tað ruddað og slættað, stendur í skrivi frá kommununi.





*Her er økið, har frítíðar- og mentanardepilin hjá Eileri Jacobsen skal byggjast. Fyrsti hakin fer í jørðina hósdagin klokkan eitt*

# Skálavíkin fær gávu fyri 35 mió

**Eiler Jacobsen, reiðari, hevur sett eina stóra verkætlan í verk í heimbygdini, Skálavík. Ein frítíðar- og mentanardepil skal byggjast í bygdini, ið fyrst og fremst skal vera karmur fyri kristiligum møtum og legum. Ætlanin er síðan gera depilin til ein part av føroysku ferðavinnuni**

BYGGING
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

25 til 35 milliónir verða nú settar í ein frítíðar- og mentanardepil í Skálavík, og fyrsti spakin fer í hósdagin. Eiler Jacobsen, reiðari, við familju stendur fyri verkætlanini, Selmar Nielsen, arkitektur, hevur teknað til. Verkætlanin fevnir um eitt nú svimjihyl, tónleika- og møtisal, fimleikarhøll og matstovu, um framt gistingarmøguleikar. Ætlanin er at hava einar 72 sengur á staðnum.

Eiler Jacobsen hevur sjálvur røtur úr Skálavík, av tí at mamma hansara gifti seg upp aftur í bygdini. Viðgongdi reiðarin greiðir frá, at bygdin tók væl í móti teimum, tá tey komu til bygdina, og hann hevur fingið tætt samband við bygdarfólkið. Linjohn Christiansen, Skálarvíkar borgarstjóri, var við á einum av fyrsti skipunum hjá reiðaranum, Sólborg, og nú samstarva teir aftur saman. Skálavíkar kommuna hevur selt grundstykkið bíliga til endamálið. Borgarstjórin sigur, at verkætlanin fær ómetaliga stóra týdning fyri bygdina, og ikki minst Sandoynna. Høvuðsendamálið hjá Eileri Jacobsen er at byggja upp eitt møtistað við einum kristiligum grundarsteini, har møguleiki verður at skipa fyri møtum og legum.

- Í Skálavík fekk eg egið skip, vit vunnu nógvar pengar, so tað er ikki løgið, at eg felli aftur til Skálavíkar, greiðir Eiler Jacobsen frá, verkætlanin er ein gáva til bygdina og til føroyingar fyrst og fremst. Depilin kann síðan nýtast til ferðavinnu, men er tó ikki høvuðsendamálið.

*Heldur tú, at føroyingar fara at koma heilt til Skálavíkar?*

- Tað verður teirra sak, sigur reiðarin, ein slík mentanardepil fer at muna meira úti á bygd. Í Havnini verður depilin bara ein prikkur í rokanum. Mann fær eitt meira persónligt tilknýti, tá mann kennir viðurskiftini.

Hósdagin klokkan eitt verður fyrsti hakin settur í, og kommunan bjóðar ein bita í kelduni aftaná.